


# Føroya Tele vil inn á danska oljumarknaðin

**Jan Müller**

10.09.2013 - 12:11

Oljan.fo

Eftir at hava gjørt sáttmálar við tvey av oljufeløgunum, sum arbeiða í danska partinum av Norðsjónum, Maersk og Hess, um fjarskiftissamband frá Cantat kaðalinum, kannar Føroya Tele nú møguleikarnar fyri at fáa fótin enn fastari á danska oljumarknaðinum.

Hetta ger felagið við at luttaka á tí fyrstu stóru oljuráðstevnuni í Danmark, sum er í Keypmannhavn í dag. Tað er danska bransjufelagið Olje Gas Danmark, sum skipar fyri og á stevnuni verða meira enn 350 luttakarar. Hesir umboða mest sum allar partar av donsku oljuvinnuni.

Fleiri framstandandi oljufól og politikarar fara at hava framløgur, teirra millum danski orku- og klimamálaráðharrin, Martin Lidegaard.

Páll Vesturbúð, stjóri í FT Net sigur við oljan.fo, at umrødda ráðstevna er eitt sera gott høvi at vita, hvar fer fram á hesum marknaðinum og ikki minst, hvat framtíðin hevur at bjóða, nú ein oljuútbjóðing eisini stendur fyri framman.

“Vit veita sum er tænastur til Maerk og Hess, og er ein slík ráðstevna ein gyltur møguleiki fyri okkum at koma á tal við aðrar operatørar í Norðsjónum, “ sigur hann og sipar her ikki minst til DONG, sum hevur fleiri pallar í Norðsjónum. Teir hava so eisini møguleika at knýta í Cantat.

Umframt Føroya Tele eru eisini fleiri umboð frá nýggja føroyska frálandareiðarríinum, Krúnborg Offshore við á ráðstevnuni. Eisini oljan.fo fer at fylgja hesi ráðstevnuni.